# Royna at fáa tað at bera til

**– Men tað er stríggið at fáa lønsemi burtur úr hýsuni, tí fiskurin er rak, og marknaðurin er veikur, sigur virkisleiðarin á Fiskavirking í Miðvági, Jason Johannesen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Líkt er til, at virksemið á Fiskavirking í Miðvági aftur er komið í eina trygga legu. Eini 60 fólk arbeiða á virkinum, og arbeitt hevur verið hvønn yrkadag seinastu vikurnar*

*Mynd: Edvard Joensen*

Fyrst í mai tók kendi og umtókti virkisleiðarin, Jason Johannesen, við aftur starvinum, sum virkisleiðari á Fiskavirking í Miðvági. Seinastu árini hevur hann verið virkisleiðari á Fiskavirking í Saltangará, men fyri ta tíð, var hann fleiri ár á virkinum í Miðvági.

Nú er hann so aftur á gomlum og kendum gøtum.

– Tað er eitt sindur øðrvísi at arbeiða her vesturi enn í miðstaðarøkinum, sum Skálafjørðurin er, tá ið ræður um fisk og fiskaframleiðslu. Í Saltangará ert nú nærri fiskinum við ikki færri enn trimum landingarmiðstøðum á eysturarminum á Skálafjørðinum. Meginparturin av fiskinum, sum virkaður verður her vesturi á virkinum, kemur í bili.

Og tó; í síðstu viku løgdu tveir trolarar veiðina upp í Miðvági. Hetta eru fyrstu skipini, sum landa beinleiðis til virkið, síðan Jason kom vestur aftur at arbeiða. Skipini vóru Vestmenningur og Vesturtúgvan, og teir høvdu eini 110.000 pund í part. Meginparturin av veiðini var upsi.

### Framleiðslan

Jason sigur, at høvuðsframleiðslan á virkinum í Miðvági er portiónir úr hýsu og upsa, harav størsti denturin verður lagdur á hýsuna.

– Tann parturin av fiskinum, sum ikki kann brúkast til portiónir, fer í blokk.

Virkisleiðarin sigur, at framleiðslan í Miðvági er meira kompliserað enn framleiðslan í Saltangará, tí meira verður gjørt burtur úr fiskinum har vesturi.

Hann sigur, at tað er stríggið at góðska fisk í løtuni, tí fiskurin er so óvanliga rak, og marknaðurin er veikur.

– Tað er einki óvanligt, at fiskurin er meira rak eftir gýting, men eg haldi, at hann sum heild er verri fyri nú, enn hann plagar. Hetta geldir bæði tosk, hýsu og upsa, og ringast fyri er tann fiskurin, sum er innari á sjónum.

Jason vísir á, at fiskurin vanliga plagar at fitna aftur, sum tað líður út á heystið.

– Eg vil siga, at upsin bleiv feitur aftur, sum tað leið út á árið, men hýsan bleiv ongantíð feit aftur í fjør heyst.

Virkisleiðarin dugir ikki at meta um, hvør orsøkin er til, at fiskurin er so illa fyri, men heldur, at hetta á ein ella annan hátt hongur saman við føðini.

### Støðugt arbeiði

Síðan Jason byrjaði aftur í Miðvági, hevur støðugt fiskaarbeiði verið á fiskavirkinum.

– Vit hava keypt væl av hýsu frá línubátunum og upsa frá trolarunum.

Hann sigur, at herfyri keypti virkið hýsu frá fýra línubátum, sum løgdu veiðina upp á Snodd og Fiskamarknaði Føroya á Toftum.

– Í løtuni keypa vit størsta partin av rávøruni beinleiðis frá skipunum, sigur hann.

Á virkinum hjá Fiskavirking í Miðvági arbeiða eini 60 fólk.

– Vit fara at royna at fáa hetta at bera til, og eg vóni, vit fáa tað at »rulla«, sum hann tekur til.

Jason Johannesen sigur, at nú heilidagur er hósdagin, liggur nakað av fiski niðurfyri til fríggjadagin.

– Men, sum er, hava vit ikki nógmikið av fiski inni til allan fríggjadagin, sigur hann at enda.



*– Tað er eitt sindur øðrvísi at arbeiða her vesturi enn í miðstaðarøkinum, sum Skálafjørðurin er, tá ið ræður um fisk og fiskaframleiðslu, sigur Jason Johannesen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Kommunurnar í Eysturoy fækkast

**Týskvøldið undirskrivaðu Runavíkar kommuna, Skála kommuna, Oyndarfjarðar kommuna og Elduvíkar kommuna undir sáttmála um samanlegging. Eftir undirskrivingina, var hugnaligt borðhald í Róðrarneystinum á Glyvrum**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Nógv fólk var samankomið til hátíðarløtuna í býráðshøllini í Saltangará týskvøldið, tá ið endaligi sáttmálin millum Runavíkar kommunu, Skála kommunu, Oyndarfjarðar kommunu og Elduvíkar kommunu varð undirskrivaður*

Við samanleggingini í Sunda kommunu og avtøku av Skála kommunu, Oyndarfjarðar kommunu og Elduvíkar kommunu, verður samlaða talið av kommunum í Eysturoy munandi minni til komandi bygda- og býráðsval, sum verður í heyst.

Týskvøldið var stór samkoma í býráðshøllini í Saltangará, tá ið tær fýra kommunurnar, sum hava avgjørt at leggja saman í eina, undirskrivaðu endaliga sáttmálan um samanlegging.

Teir, ið undirskrivaðu, vóru vegna Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen, vegna Skála kommunu, Kári Johannesen, vegna Oyndarfjarðar kommunu, Árni Joensen og vegna Elduvíkar kommunu, Andrias Hammer.

Allir kommunustýrislimirnir vóru bodnir við til undirskrivingina við maka. Landsstýrismaðurin, Jógvan á Lakjuni og Hilmar Høgenni, sum starvast á kommunalu deildini hjá landsstýrinum, vóru eisini hjástaddir við undirskrivingina.

### Døgurði

Eftir at formellu tingini vórðu fingin uppá pláss í býráðshøllini í Runavík, varð borðreitt við døgurða í Róðrarneystinum á Glyvrum. Lagt varð fyri við fiskarætti sum forrætti, og síðan fingu tey, sum vóru við til hátíðarløtuna, ein leskiligan kjøtrætt.

Undir borðhaldinum, sang kvinnukórið í Glyvra kirkju, og Katrin Houland Petersen spældi á streingir.

Við borðhaldið, vórðu røður hildnar, og Rodmundur Nielsen, býráðsformaður í Runavík, sigur, at fólk vóru í góðum hýri.

– Øll vóru positiv, og stemningurin var góður.

Hátíðarløtan í Róðrarneystinum byrjaði klokkan 20 og hildið varð á til út ímóti midnátt.

### 11 veljast

Rodmundur Nielsen sigur, at tá ið býráðsval verður í heyst, skulu 11 limir veljast í Runavíkar býráð.

Samanleggingin kemur í gildi, 1. januar 2005, men samstarvið millum kommunurnar er langt síðan byrjað.

Nýggjasta kommunan, sum komin er við í samstarvið, er Elduvíkar kommuna.

Longu kvøldið eftir undirskrivingina vóru bý- og bygdaráðini samlaði í skúlanum í Funningsfirði til fundar. Eftir fundin, varð farið ein rundtúr í Elduvíkar kommunu.

– Vit fara at seta ferð á samstarvið beinanvegin, og ætlanin er at fáa nógv frá hondini longu fyri summarfrítíðina. Longu í kvøld fara vit at umrøða felags fíggjarætlanina fyri komandi ár, segði Rodmundur Nielsen, tá ið vit høvdu hann í telefonini í gjár.

Í løtuni búgva 3.620 fólk í Runavíkar kommunu og hinum trimum kommunum, sum leggja saman við Runavíkar kommunu, 1. januar 2005.

# Rodmundur ikki avvísandi um Funning

**– Men eg dugi illa at ímynda mær, at nakað fer at spyrjast burtur úr hesum, nú so lítið er eftir av hesum valskeiðnum, sigur býráðsformaðurin**

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein av teimum smáu kommununum, sum stendur einsamøll, nú fleiri kommunur í Eysturoy hava avgjørt at leggja saman, er Funnings kommuna.

Gjáar kommuna verður við í Sunda kommunu, og Elduvíkar kommuna leggur saman við Runavíkar kommunu. Sostatt kemur Funnings kommuna geografiskt at liggja ímillum hesar báðar kommunurnar.

Vit spurdu Rodmund Nielsen, býráðsformann í Runavíkar kommunu, um tað kann hugsast, at Funnings kommuna eisini fer at taka avgerð um møguliga samanlegging við Runavíkar kommunu í hesum valskeiðnum.

– Tað er torført at siga, nú hetta skeiðið er liðið so langt út, men vit kunnu ikki púrasta útiloka hesum.

Býráðsformaðurin vísir á, at eitt ávíst samstarv longu er millum kommunurnar, sum nú leggja saman og Funnings kommunu, eitt nú í samband við skúlan og koyring av skúlabørnum.

Rodmundur Nielsen sigur, at enn eru kortini ongar ítøkiligar ætlanir um samanlegging við Funnings kommunu, og hann dugir illa at ímynda sær, at nakað fer at spyrjast burtur úr hesum tað, ið eftir er av valskeiðnum.

– Men kortini kunnu vit ikki púrasta útiloka hesum møguleika, sigur hann.



# Orðaskiftið um trygdarpolitikk

**Menn vórðu hvassorðaðir, tá Løgtingið seinasta dagin í hesi tingsetuni viðgjørdi uppskotið til samtyktar hjá Jóannesi Eidesgaard. Her eru nøkur brot úr orðaskiftinum.**



**Hergeir Nielsen, tingmaður:** Henrik Old og aðrir góðir javnaðarmenn tosa um, at nú skal mann hava innlit og ávirkan, og so skal mann taka ábyrgd. Altso: mann skal fara inn og taka ábyrgd og ikki kunna avgera nakað sum helst. Tað er tað, ið Føroya Javnaðarflokkur stendur her uppi og sigur í dag. "Innlit og ávirkan, so mann kann taka ábyrgd," søgdu teir. Men at taka avgerðir, tað er ein býur í Kina. Tað kunnu danir og aðrir gera (...) "Stig á sjálvstýrisleið," sigur John Johannessen. Ja, einaferð var tað soleiðis í Onglandi, at teir kjakaðust um at leggja ferðsluna yvir í høgrakoyring, og tá kom eitt ljóst høvd og segði, at hvat við at taka tað stig fyri stig og lata lastbilarnar byrja at koyra í høgru síðu. Hetta minnir meg nakað um tað. Vit taka lastbilarnar yvir í høgru síðu fyrst, og so fáa vit tann fullkomna ruðuleikan. Tað er eitt væl-dokumenterað roknistykkið, sum sigur, at danir hava spart 40 milliardir krónur yvir 14 ár fyri at hava brúkt Føroyar og Grønland sum bumbumál. Tað er eitt roknistykki, sum vert er at hyggja eftir í øllum hesum her samanhanginum.

**Jóannes Eidesgaard, løgmaður:** Málsøkið er enn eitt felagsmál. Tað er væl tann munurin millum Hergeir Nielsen og eitt nú meg sjálvan, tað er tað, at eg viðurkenni tann veruleikan, at tað er eitt danskt málsøki. Men tað er ikki forbundið nakrar útreiðslur við tað, at vit fáa innlit og ávirkan.



**Høgni Hoydal, tingmaður:** Tað sum er broytt nú, tað er, at nú góðtekur Jóannes Eidesgaad, løgmaður, alt tað sum hann higartil hevur mótmælt ímóti, eisini sum tingmaður, nevniliga at avgerðir verða tiknar yvir høvdið á Løgtinginum í hernaðar- og trygdarpolitiskum málum.



**Jóannes Eidesgaard, løgmaður:** Viðvíkjandi tí breiðu semjuni. Jú, tað er rætt, at tað hevði verið ynskiligt, men mínar royndir higartil í uttanlandsnevndini vísa, at uttan mun til hvussu leingi hetta málið hevði ligið í uttanlandsnevndini - um tað hevði ligið nú ein mánað afturat, tveir mánaðir, eitt ár afturat, og um øll høvdu verðið innkallað - so trúgvi eg ikki uppá, at Tjóðveldisflokkurin hevði kunnað sæð tann politiska veruleikan í eyguni alíkavæl, og hann hevði enn hildið seg til tað, at dreymurin er nakað annað, enn tað sum... (tíðin farin)

**Hergeir Nielsen:** Støðan hjá Javnaðarflokkinum er ein stór "joke" í hesum málinum.

# Eivør ummæld í Svøríki

Ummælarin Bengt Eriksson skrivar í Göteborg-Posten týsdagin tann 6. apríl, at nýggjasta útgávan hjá Eivør Pálsdóttir er "fantastisk." Hann gevur Krákuni fimm út av fimm møguligum vitum, og fær Eivørt tískil besta skoðsmál frá Benkt Erikson. Um Krákuna skrivar svenskarin, at útgávan er "underbart, urskönt, ljuvligt, himmelskt, romantiskt, och naturnära."

**hkm**

# Heilsufrøðiliga setir forboð

Ymisk aliøki kring landið hava fingið forboð at seta fisk út. Tað er Heilsufrøðiliga starvsstovan, sum hevur sett 13 forboð í verk. Orsøkirnar eru tvinnar: Ov nógv dálking og vantandi botnkanningar. Átta av forboðunum er orsakað av ov stórari dálking, og hini fimm hava fingið forboð grundað á vantandi botnkanningar. Umleið 30 aliøki eru tilsamans kring oyggjarnar.

**hkm**

